## Obama fær nýskipan

Amerikanska Senatið samtykti gjáranáttina at viðgera uppskotið hjá Barack Obama um eina nýskipan á heilsuøkinum. Uppskotið kravdi minst 60 atkvøður í Senatinum, og tað eydnaðist at fáa tær neyðugu atkvøðurnar. Allir teir 58 demokratisku senatorarnir atkvøddu fyri, og tað gjørdu tveir óheftir senatorar eisini. Hinvegin atkvøddu 39 republikanskir senatorar ímóti, og ein republikanari atkvøddi ikki. Um eina viku fer Senatið undir at viðgera nýskipanaruppskotið. Roknað verður við, at viðgerðin fer at taka tríggjar vikur. Tað merkir, at uppskotið kann avgreiðast fyri jól, og at forsetin kann staðfesta tað um ársskiftið.



## ES kundi valt betur

Fleiri politiskir viðmerkjarar undrast á avgerðina hjá ES-leiðarunum at velja Herman Van Rompuy til forseta og Catherine Ashton til uttanríkisráðharra í samveldinum. Millum teirra, sum undrast, er fyrrverandi danski uttanríkisráðharrin Uffe Ellemann-Jensen. Í samrøðu við DR sigur hann, at ES-leiðararnir áttu heldur at valt fólk, sum veruliga høvdu gjørt mun á altjóða pallinum. Eitt nú heldur hann lítið um uttanríkisráðharravalið. Uffe Ellemann-Jensen heldur, at fleiri betri valevni vóru so sum svenski uttanríkisráðharrin, Carl Bildt, og fyrrverandi týski uttanríkisráðharrin Joschka Fischer. Tað hevði verið nakað heilt annað, heldur Uffe Ellemann-Jensen.

# Fólkaskúlin spara fimm milliónir

FÓLKASKÚLIN

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Umfatandi tiltøk skulu nú setast í verk fyri at rationalisera fólkaskúlan við fimm milliónum krónum.

Tað upplýsir Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í mentamálum fyri løgtingsis fíggjarnevnd, nú fíggjarlógin fyri 2010 er til viðgerðar.

Fær hon ikki undirtøku fyri hesum broytingum, verður neyðugt at lækka tímatalið í skúlanum samsvarandi.




*Næstu tíðina skulu umfatandi broytingar gerast í fólkaskúlanum, men eydnast tað ikki, verður neyðugt at skerja tímatalið*

### Betri rakstur

Høvuðsendamálið við ætlaðu tiltøkunum er at leggja skúlar saman fyri at rationalisera raksturin.

Í tí sambandi ætlar hon at leggja uppskot fyri Løgtingið um at avtaka reglurnar, sum siga, at áðrenn talan kann verða um at niðurleggja skúlan í eini bygd, skal fólkaatkvøða vera í bygdini um tað.

Hon ætlar eisini at sleppa at avtaka reglurnar um, at flokkar ikki kunnu umskipast, eftir at næmingarnir eru býttir í flokkar.

Harumframt ætlar hon at fáa heilmild til at fara undir samráðingar við lokalar skúlamyndugleikarnar við tí endamáli at skipa skúlasambond, sum skulu samsvara við talið á kommununum, eftir at ætlaða samanleggingin er fram, so at ein kommuna verður eitt skúlasamband.

Men eydnast ikki at finna semju í seinasta lagi 1. januar í 2012, vil hon hava heimild til at skera ígjøgjum og skipa skúlasambondini sjálv.

Og at enda vil Helena Dam á Neystabø hava heimild til at skipa læraratalið í hvørjum skúlasambandi ella skúla eftir næmingatalinum.

### Fullnýta raksturin

Hon sigur, at hetta fer at skapa møguleiki at fullnýta bæði kommunala raksturin og landsjáttina til fólkaskúlan, soleiðis at umstøður vera til at menna tvílæraraskipanina, veita lærarum eina munagóða og skipaða eftirútbúgving, seta fleiri NSR tænastur á stovn, umframt at skipa eftirskúla og ymisk royndar- og menningarvirksemi.

# Løgtingslimir ímóti seyði fáa óvæntaðan stuðul

SEYÐUR AV VEGNUM

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Uppskotið hjá nøkrum løgtingslimum um at fáa seyðin og onnur kríatúr burtur av landsvegnum og burtur úr bygdunum, hevur sanniliga fingið fáar vinir og nógvar fíggindar.

Í øllum førum um vit skulu meta eftir teimum, sum hava gjørt vart við seg alment

Eitt nú hava bæði Bóndafelagið og Óðalsfelagið gingið hond í hond um at fordøma uppskotið, sum nakrir løgtingslimir hava lagt fyri Løgtingið um at beina seyð, neyt og onnur nyttudýr, burtur av vegunum og burtur úr bygdum øki.

Tey bæi feløgini umboða ein heilt stóran part av teimum, sum eiga seyð, neyt og onnur kríatúr.

Men uppskotsstillararnir hava í øllum førum fingið ein fjeppera, tí nú hevur Fámjins Kommuna boðað vinnunevndini hjá Løgtinginum frá, at fámjingingar taka fult undir við uppskotinum um at fáa seyðin burtur av alfaravegi og at fáa leysgangandi seyð burtur úr bygdunum.

Ein partur av uppskotinum er, at hereftir skulu tað vera tey, sum eiga seyð, neyt og onnur kríatúr, sum sjálvi skulu bera kostnaðin av at hegna framvið vegum fyri at halda dýrini burtur.

Eisini hesum endamálinum tekur Fámjins kommuna undir við, tí bygdaráðið sigur, at tað hevði verið alt ov dýrt hjá kommununi at goldið endurgjald fyri mist vetrarbit, samstundis sum tann leysgangandi seyðurin er til stórt forargilsi og er til ampa fyri trivnaðin.



*Fámjins Kommuna tekur fult undir við uppskotinum hjá nøkrum løgtingslimum um at seyð og onnur kríatúr burtur av alfaravegi og burtur úr bygdunum*